

# Á BREDDAN KOMA NÚ **POLITISKAR NÝSKIPANIR**

**SKINKLANDI** POLITISKA **GONGULAGIÐ** ER AVLEIÐINGIN AV EINI **KREPPU**, SUM ØLL TANN POLITISKA **SKIPANIN** ER Í. HON FINNUR **IKKI** ÚTAV, **HVØR** POLITISKA **VERKÆTLANIN** FYRI **FØROYAR** ER. **LOYSNIN** SIGST VERA **REFORMAR**, MEN HESIR REFORMAR **LJÓÐA MEIRA** SUM ÓÍTØKILIG **YNSKIR** ENN ÍTØKILIGAR **ÆTLANIR**. TØRVUR ER Á EINI **POLITISKARI** SAMANSETING, SUM SETIR **GREIÐ** MÁL FYRI **FØROYAR** OG **FRAMTÍÐINA**, OG **SANNLÍKT** ER, AT **LANDSSTÝRIÐ**, IÐ VERÐUR **SKIPAÐ** EFTIR VALIÐ, **VERÐUR** EITT **NÝSKIPANARLANDSSTÝRI**



**GREINING**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Tann søguligi samgongumeirilutin við Sambandsflokkinum, Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum, ið sá dagsins ljós í 2004, gav upp ond mikudagin. Fólkaflokkurin vildi ikki taka undir við fíggjarkørmunum fyri komandi árini og tók seg úr samstarvinum. Verða teir níggju mánaðirnir hjá CHE-samgonguni millum januar og september í 2008 drignir frá, helt ABC-samgongan saman í eitt og eitt hálvt valskeið. Hon gjørdist sostatt líka drúgv sum yvirtøkulandsstýrið frá 1975 til 1980 og fullveldislandsstýrið frá 1998 til 2003. Kanska prógvaði hon á tann hátt, at stevið hjá eini samgongu mangan er í lagi fyrsta valskeiðið, men í ólagi næsta valskeiðið.

Samgonguslitið hesaferð hevur leingi verið væntandi. Stevið í samgonguni hevur verið út av lagi vánaligt, og hevði samgongan ikki havt ein løgmann, sum allatíðina royndi at kyrra stríðandi partar og finna semjur, hevði samgongan verið fokin fyri einum ári síðan, tá Fólkaflokkurin heldur ikki vildi taka undir við fíggjarkørmunum. Hann slapp tá at halda fram sum tann sterki flokkurin í samgonguni, ið bæði setti seg ímóti semjum millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin og legði fíggjarpolitikkin mestsum av nýggjum í fíggjarnevndini, har Anfinn Kallsberg og hinir nevndarlimirnir hugnaðu sær við at gera, sum teir vildu.

## Nýggir menn á pallinum

Líkt var til, at søgan skuldi endurtaka seg í vár, men tað gjørdi hon ikki. Høvuðsorsøkin til tess var, at tveir týðandi leikarar á politiska pallinum takkaðu fyri seg, og at valdsjavnvágin millum Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin broyttist. Í januar mynstraði Jørgen Niclasen av skútuni í Uttanríkisráðnum og vildi í staðin sleppa at vera fíggjarnevndarformaður. Samstundis fór Anfinn Kallsberg til hús eftir 30 ár í politikki. Stutt eftir fór Jóannes Eidesgaard úr Fíggjarmálaráðnum og formanssessinum í Javnaðarflokkinum, og Aksel Johannesen tók við báðum sessunum. Burtur vóru brádliga Anfinn og Jóannes, ið altíð kundu finna útav av semjast um maktina.

Fortreytirnar hjá Fólkaflokkinum fyri at gera, sum flokkinum lysti, vóru tí als ikki tær somu í ár sum í fjør. Jóannes Eidesgaard hevur í mong ár lagt størri dent á pragmatiska telving enn at standa fast við prinsipp og hugsjónir, helst fyri at varðveita maktina. Hann toldi tí Fólkaflokkin, tá flokkurin í fjør segði seg vera ímóti fíggjarkørmunum. So lagaligur er Aksel Johannesen eftir øllum at døma ikki. Hann legði til brots við at sláa fast, at Javnaðarflokkurin er ein samríkisflokkur. Hann sló fast, at 60.000 tons av makrelinum skulu seljast á uppboði, og hann kravdi at fáa at vita, um Fólkaflokkurin var við í samgonguni ella ikki.

Fólkaflokkurin gav undir samráðingunum um fíggjarkarmarnar í Fíggjarmálaráðnum hinum samgonguflokkunum fatan av, at full semja var um karmarnar. Tað hava Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin ið hvussu er sagt. Helst ímyndaði Jørgen Niclasen sær, at hann skuldi gera tað sama, sum Anfinn Kallsberg plagdi, nevniliga leggja fíggjarlógina eftir egnum høvdi í fíggjarnevndini, tá karmarnir komu í tingið. Tað slapp hann bara ikki fyri nýggja formanninum í Javnaðarflokkinum. Um Fólkaflokkurin var ímóti kørmunum, máttu hann siga, um hann var við ella ikki, og tá tingviðgerðin nærkaðist, varð hann noyddur at taka endaliga støðu – og fór.

Hvør er vinnari og tapari í tí, sum hent er í samgonguni, veldst um eyguni, ið síggja, men neyvan fær Jørgen Niclasen rós í øllum Fólkaflokkinum fyri sítt politiska handalag seinastu mánaðirnar. Fyrst avsegði hann sítt egna uttanríkisráð og steig í risastóru skógvarnar hjá Anfinni Kallsberg í fíggjarnevndini fyri at gerast sterki maðurin har. Tá fíggjarkarmarnir vóru á veg í tingið, setti hann seg ímóti teimum, og meðan fyrrverandi fólkafloksmaðurin, Poul Michelsen, skrivaði stevnuskrá fyri sín nýggja flokk, Framsókn, háláði Jørgen Niclasen stikkið úr samgognuni og setti seg heilt uttan fyri ávirkan. Tað hevði Anfinn Kallsberg neyvan gjørt.

## Blokerandi minnilutar

Á tíðindafundinum mikumorgunin í Tinganesi og í formansumfarinum í sjónvarpinum mikukvøldið segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, at skulu Føroyar flytast framá, mugu fremjast bygnaðarbroytingar, ið kunnu gera samfelagið bíligari at reka. Men, segði hann eisini, minnilutar forða áhaldandi fyri, at týðandi reformar á eitt nú fiskivinnuøkinum, kommunuøkinum og